# Skulu bara spælast

**HONDBÓLTUR** Einasta, ið eftir er at spæla um, nú seinastu dystirnir í hondbóltslandskappingini eru á skránni, er um VÍF ella H71 skal fáa bronsu í Atlantic Airways-kappingini

Hilmar Jan Hansen

Landskappingin í hondbólti nærkast endanum, og bara dystirnir um vikuskiftið eru eftir, so er klárt at spæla FM-finalurnar. Har er longu greitt, at hjá kvinnum møtast Stjørnan og Neistin og hjá monnum Neistin og KÍF. Hjá kvinnunum er somuleiðis greitt, at Tjaldur vinnur bronsuna.

Hinvegin er júst bronsan einasti spurningurin, ið ikki er svaraður, tí har hava bæði VÍF og H71 møguleikan. Og tí er dysturin í Hoyvíkshøllini í annaðkvøld millum hesi bæði feløgini tað einasta, ið kann flyta nakað av týdningi, áðrenn sjálv landskappingin endar.

VÍF er undan dystinum eitt stig framman fyri H71, so vestmenningar kunnu standa seg við javnleiki, meðan H71 má vinna dystin, skal liðið fáa heiðursmerkini. Í kvøld spæla StÍF og KÍF á Skála og sunnudagin tekur Neistin í Havn ímóti Team Klaksvík.

Hjá kvinnunum kundi dysturin sunnudagin millum Neistan og Stjørnuna havt nakað at sagt, var tað ikki tað, at Stjørnan var trý stig frammanfyri. Tí er longu greitt, at Stjørnan endar fremst í landskappingini og vinnur rættin til heimavøll í einari møguligari triðju FM-finalu, meðan Neistin verður verandi á næstfremsta plássinum og sleppur í finaluna.

Sjálvandi kann vera áhugavert at síggja hesi bæði liðini spæla ímóti hvørjumøðrum, nú tey allíkavæl skulu spæla finalurnar, men neyvan fara tey at avdúka ov nógv av sínum komandi taktikki. Eftir eru so dystirnir í kvøld í Vestmanna millum Tjaldur og VÍF og á Skála millum StÍF og VB, sum bara av kosmetiskum týdningi, tí teir broyta einki í endaligu støðuni.

hilmarjan@sosialurin.fo




*Kvinnurnar hjá Neistanum og Stjørnuni skulu spæla FM-finalur á páskum, men sunnudagin møtast liðini bæði eisini í seinasta dysti í landskappingini í vetur*
Mynd: Álvur Haraldsen

# Dómaraverkfallið avblást

**HONDBÓLTUR** Fleiri ivasamar avgerðir hjá kappingarnevndini hóttu við at leggja allan hondbóltin í Sunset- og Atlantic Airways-kappingini deyðan í óásetta tíð. Men eftir at hondbóltsdómararnir hava fingið lyfti um eina aganevnd, hava teir avblást ætlaða verkfallið

Hilmar Jan Hansen

Mikudagin boðaðu hondbóltsdómararnir frá, at teir fóru at leggja niður alla døming í Sunset- og Atlantic Airways-kappingini fyribils, tí teir vóru sera ónøgdir við kappingarnevndina hjá Hondbóltssambandinum. Serliga vóru teir misnøgdir við viðgerðina, kappingarnevndin í vetur hevur havt av kærum um reyð kort og annað.

– Stóri trupulleikin er, at fólkini í Kappingarnevndini ikki eru egnað at sita har, og at dómararnir ikki verða tiknir í álvara. Okkara frágreiðingar verða ikki tiknar í álvara, segði Andreas F. Hansen, næstformaður í dómarafelagnum og altjóða dómari, við Rás 2.

– Hondbóltssambandið, sum er okkara arbeiðsgevari, vil ikki verja síni starvsfólk, sum í hesum føri eru dómararnir, og tað góðtaka vit ikki. Vit hava boðað frá, at vit døma ikki aftur fyribils, og tað er upp til Hondbóltssambandið at finna útav, hvussu knúturin verður loystur.

Ein sera álvarslig støða, nú hondbóltskappingin var komin so langt, at bara eitt umfar var eftir hjá kvinnum og monnum áðrenn FM-finalurnar skuldu spælast.

## Semja um aganevnd

Men í gjáramorgunin bórust so onnur tíðindi, tí tá eydnaðist Hondbóltssambandinum og dómarunum at koma til eina semju, sum fevndi um eina nýggja aganevnd, sum skal viðgera kærur um reyð kort og annað, so kappingarnevndin ikki longur skal taka sær av hesum. Restina av hesum kappingarárinum skal ein arbeiðsbólkur røkja uppgávuna, men frá komandi kappingarári kemur aganevndin.

Í hesi nýggju aganevndini, ið fær virknað frá komandi kappingarári, skulu vera umboð fyri Hondbóltssambandið, kappingarnevndina og dómarafelagið, umframt at ein óheftur juristur eisini skal vera limur í nevndini. Sum skilst, hevur ein slík aganevnd leingi verið eitt ynski, men nú verður hon so veruleiki.

## Kunnu ikki kærast

– Tað er eingin loyna, at vit hava verið ósamdir við kappingarnevndina í fleiri málum fyrr í ár. Vit eru grundleggjandi ósamd um, hvussu málini skulu avgreiðast, segði Andreas F. Hansen við Rás 2 í gjár.

Tað var serliga ein hending um vikuskiftið, ið fekk bikarið at flóta yvir. Hetta var, tá ein spælari, sum slóð reyða kortið úr hondini á dómaranum, samstundis sum hann hótti dómaran, slapp við karantenu í bara tveir dagar, hóast ein slík gerð undir øllum vanligum umstøðum skuldi givið munandi longri karantenu.

Sum heild hevur kappingarnevndin í vetur ikki givið karantenur, sum hava verið longri enn tveir dystir. Hesar karantenur eru soleiðis háttaðar, at tær kunnu ikki kærast, men verður farið upp um tveir dystir, ber til at kæra karantenurnar. Tvey undantøk hava tó verið.

Annað undantakið var ein 1. deildarspælari, sum fekk karantenu í eitt heilt ár fyri at hava gjørt seg inn á ein mótspælara, men hann kærdi og fekk viðhald frá dómsnevndini, sum ógildaði karantenuna. Hitt undantakið var, tá fyrrverandi venjarin hjá Team Klaksvík fekk karantenu í tríggjar dystir, tí hann hevði sagt sína hjartans meining um dómararnar.




*Hondbóltsdómararnir hava fingið lyfti um eina aganevnd frá komandi kappingarári at rokna, og tí hava teir avblást ætlaða verkfallið, ið hevði gjørt, eingir dystir kundu verið spældir í Sunset- og Atlantic Airways-kappingini fyribils*
Mynd: Álvur Haraldsen

### Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 23 | 653 | 542 | 111 | 39 |
| 2 | Neistin | 23 | 657 | 514 | 143 | 36 |
| 3 | Tjaldur | 23 | 645 | 562 | 83 | 33 |
| 4 | VB | 23 | 598 | 579 | 19 | 26 |
| 5 | Kyndil | 24 | 553 | 606 | -53 | 16 |
| 6 | VÍF | 23 | 517 | 636 | -119 | 7 |
| 7 | StÍF | 23 | 463 | 647 | -184 | 5 |

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 23 | 801 | 643 | 158 | 41 |
| 2 | KÍF | 23 | 646 | 591 | 55 | 30 |
| 3 | VÍF | 23 | 657 | 603 | 54 | 25 |
| 4 | H71 | 23 | 644 | 609 | 35 | 24 |
| 5 | Kyndil | 24 | 621 | 639 | -18 | 23 |
| 6 | StÍF | 23 | 624 | 611 | 13 | 17 |
| 7 | Team Klaksvík | 23 | 541 | 838 | -297 | 2 |